# Skrædl á fiskavirkjunum

**2003 var eitt katastrofalt ár fyri traditionellu fiskivinnuna á landi: úrslitið liggur um ein tíggjundapart av úrslitinum fyri 2002**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*



Árið ið fór sá eitt skrædl í føroyskari flakavinnu, og tað nýggja árið gevur alt annað enn stjørnur í eyguni hjá hesari vinnu. Sambært upplýsingum frá Ráfiskakeyparafelagnum lógu úrslitini fyri 2003 hjá hvítfiskaframleiðarunum í miðal um katastrofal 10 prosent av úrslitinum fyri 2002, við einum miðal vinnings marginali undir eitt prosent av umsetninginum.

– Úrslitið sum heild fyri 2003 hjá traditionellu fiskivinnuni var ógvuliga vánalig, viðmerkir Agnar Jensen frá Ráfiskakeyparafelagnum.

– Tað vóru hóast alt nøkur virkir, ið kláraðu seg væl, men samstundis vóru onnur, ið gingu við undirskoti; í miðal var úrslitið so ringt sum umleið ein tíggjundapartur av úrslitinum árið fyri.

## Ov stórur váði

Eftir øllum at døma er umsetningurin ikki av leið, ei heldur virðisøkingin á virkjunum. Hinvegin vísa vinningsmarginalarnir seg at vera minimalir, og tað sum minni er. Meðan saltfiskaframleiðarar klára seg, gongur verri hjá flakavirkjunum.

– Tilsamans umsettu teir traditionellu hvítfiskaframleiðararnir fyri meira enn eina milliard krónur, men tann samlaði vinningurin av hesum var ikki meira enn knappar 10 milliónir.

– Trupulleikarnir eru fleiri, men í høvuðsheitum hevur hendan vinnan ein alt ov stóran váða í mun til úrtøkuna. Marginalarnir eru so smáir, at sjálvt minstu útsving í prísum og øðrum parametrum merkjast ógvuliga kraftiga; tað skal so at siga einki til, fyri at tað gongur galið. Hóast virðisøkingin hækkaði í fjør, so varð alt etið upp av einum galopperandi kostnaðarstigi.

Agnar Jensen byggir síni tøl á upplýsingar, ið vórðu lagdar á borðið á einum fundi, sum nýliga varð hildin millum ráfiskakeyparar.

– Virkini, sum vóru samlað á fundinum, umboða góð 80 prosent av traditionellu flakavinnuni, tað er hvítfiskaframleiðsluni; teirra samlaða úrslit gjørdist ikki meira enn 7-8 milliónir fyri 2003.

## Døpur útlit

Umframt kostnaðarstigið sum heild rakti verkfallið í fjør meint. Útlitini fyri tað nýggja árið eru samstundis alt annað enn góð.

– Í 2002 høvdu virkini 12 mánaðir at tjena pening meðan tey í 2003 vegna verkfallið ikki høvdu meira enn góðar 10 mánaðir, sigur Agnar Jensen.

Umframt eitt lutfalsliga sera høgt kostnaðarstig eru trupulleikarnir fleiri hjá fiskivinnuni. Eitt er kappingin eystanífrá, har ráfiskur verður keyptur bíliga frá russum og framleiddur enn bíligari av kinesarum, fyri síðani at verða floymdur inn á marknaðirnar, trýstandi fiskaprísir sum heild niður, tó serliga prísirnar á frystum upsa. Eitt annað er hørð kapping við skotar bæði í keypi og sølu av fiski. Skotsk virkir, ið keypa stórar partar av tí føroyskt veidda fiskinum, hava fleiri kappingarligar fyrimunir í mun til okkara: millum annað lægri lønir, stuðul til íløgur, støddar- og góðskuskildan fisk.

Okkara største fyritøka, Føroya Fiskavirking, váttar tey døpru tølini og dylir ikki fyri, at útlitini fyri í ár eru døpur.

– Okkara úrslit gjørdist ikki meir enn 3-5 milliónir í mun til 17 milliónir árið fyri, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking.

– Vit rokna ikki við stórum bata í 2004… Eg dugi ikki at síggja, hvat ið skal gera okkum meira kappingarfør í mun til útheimin; kappingarneytarnir virka jú ikki rotnan fisk.

# Brúkarar spyrja politikkarar

**Brúkarasamtakið metir eina brúkaralóggávu sum alneyðugan part av føroyska samfelagnum**

BRÚKARAR & POLITIKKUR
*Tíðindaskriv frá*



Brúkarasamtakið sum hevur til endamáls at virka fyri at vit fáa ein almennan brúkaraumboðsstovn at upplýsa brúkaran um sínar skyldur og rættindi mótvegis sølufyritøkum, varð stovnað fyri góðum ári síðan. Samtakið er eitt sjálvboði felag við limum og einasta inntøkukelda er limagjaldið. Harafturat hava vit fingið peningaliga hjálp til at stovna felagið frá Norðurlandaráðnum ta fyrsta árið.

Nú ta stundar til val, hava vit sett okkum fyri at spyrja politisku flokkarnir nakrar spurningar. Vit hava tá ið felagið varð stovnað vent okkum til politikararnir og biðið um eina fasta játtan á fíggjarætlanini til at kunnað reka felagið, men svarið hevur verið negativt.

Í januar í fjør skipaðu vit fyri pallborðsfundi í Norðurlandahúsinum, har Hagen Jørgensen, danskur brúkaraumboðsmaður var gestarøðari og tá fingu allir politisku flokkarnir høvi at siga sína hugsan um ein almennan brúkarapolitikk í Føroyum.

Vit hava spurt flokkarnar hesar spurningar:

Um flokkur tygara kemur í samgongu komandi valskeið.

Vilja tit virka fyri:

• at vit fáa eina góða brúkaraverju í Føroyum, tí sum nú er, er brúkarin verjuleysur?

• at vit fáa hóskandi lóggávu á økinum, bæði sett manglandi lógir í verk (m.a. um marknaðarføring) og dagført tað avoldaðu keypilógina?

• at vit fáa ein brúkaramyndugleika, sum kann taka sær av brúkaramálum, skipa fyri brúkarakunning o.ø.?

• at vit fáa ein brúkarakærunevnd, sum brúkararnir kunnu venda sær til við kærum, tá teir halda seg vera fyri órætti?

At enda: ein stutt frágreiðing:

• Hvussu ætlar flokkurin at fremja hetta í verki?

Bert 4 flokkar hava svarað, so vit mugu ganga út frá at hesir halda at eingin lóg á økinum er nóg gott sum er: Hinir hava svara soleiðis:

Miðflokkurin svarar at flokkurin vil virka fyri, at allir brúkarar verða væl vardir av lógini. At brúkarin er verjuleysur, er ein pástandur, vil flokkurin verða við.

Hann vil virka fyri at vit fáa hóskandi lóggávu á økinum og at vit fáa dagført verandi lógir eftir føroyksum leisti.

Miðflokkurin vil virka fyri at vit fáa føroyskar lógir og at keypilógin verður dagførd.

Flokkurin metir, at av tí at samfelag okkara er so lítið, kundi onkur av núverandi stovnum tikið sær av brúkaramálum, t.d. kappingaráðið.

T.d. kundi Kappingaráðið eisini at tikið sær at brúkaraklagum, metir flokkurin.

Sjálvstýrisflokkurin vil virka ja-liga til allar 4 spurningarnar. Harafturat vil flokkurin virka fyri at vit fáa frían handil, men brúkarin skal hava trygd og góðar sømdir.

Sjálvstýrisflokkurin vil stuðla brúkarafeløgum og møgulig seta á stovn eina almenna brúkaravernd, (brúkaraumboðsmann). Tað er týdningarmikið, at talan ikki verður um enn ein tungan almennan stovn, men eina effektiva, einkla og bíliga skipan.

Javnaðarflokkurin svarar at hann fyri tveimum árum síðan legði drúgt álit fram á ting um hvussu neyðugt tað er at vit fáa ein brúkarapolitikk í Føroyum og at vit fáa sett í verk eina brúkaralóggávu. Tvey uppskot vóru løgd fram, annað var uppskot til lóg um marknaðarføring við brúkaraumboði, og hitt var lóg um brúkarakærunevnd, men bæði uppskotini vórðu feld av táverandi samgongu.

Flokkurin heldur at brúkaramál hava alstóran samfelagsligan týdning og metir ikki at hesi kunnu røkjast bert á sjálvbodnum privatum grundalagi.

Flokkurin tekur fult undir við teimum spurningum vit hava sett teimum og til tess at fremja eina góða brúkaraverju ætlar flokkurin um hann kemur í samgongur, at seta í verk eina tíðarhóskandi brúkaralóggávu, við brúkarakærunevnd og brúkaraumboði, til tess at fremja brúkarakunning og tryggja rættindini hjá brúkarunum, sigur Henrik Old vegna Javnarðarflokkin.

## Tjóðveldisflokkurin

Flokkurin fegnast um sjálvbodna initiativið hjá Brúkarasamtakinum og sigur seg taka fult undir við endamálum felagsins.

Tjóðveldisflokkurin hevur brúkaramál sum part av sínum stevnumiðum, sum vórðu endurskoðaði í 2001 og er hetta tí politikkur floksins.

Vanligi brúkarin skal hava møguleika at fáa innlit í dygd, uppruna, umhvørvisfyrilit og reiðiligan prís á øllum vørum og tænastum. Flokkurin meinar harafturat at vit sum skjótast skulu hava eina brúkaralóggávu, ið áleggur veitarum skyldur og ásetir rættindi hjá brúkarum.

Lóggávan skal seta krøv viðvíkjandi upplýsing um prís, dygd, innihald (vinning av tænastuni).

Ein brúkarastovnur verður settur á stovn og hevur hesin eftirlit við, at lógir og reglur verða hildnar, og hagar kunnu brúkarar kæra um veitingar, ið ikki lúka treytirnar í brúkaralógini, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins við Brúkarasamtakið .

At enda kunnu vit í brúkarasamtakinum bert staðfesta at ein lóg á hesum økinum er alneyðug til tess at tryggja einstaka brúkaranum, tað vísa dagligu áheitaninar vit fáa frá fólki, ið ikki veit hvussu tey skulu bera seg at tá ið tey hava verið fyri vanbýti í brúkaramálum.




























